NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Føðingar

19. november fingu Marianna og Finn Hansen, Brønshøj, eina dóttur. Hon vigaði 3200 gr og var 50 cm long.

5. desember fingu Sonja Weihe og Lars Gotved Jacobsen, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3800 gr. og var 52 cm langur.

16. desember fingu Yvonna og Óli Toftum, Vági, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3300 gr.

17. desember fingu Eyðgunn Poulsen og Jákup Follend Mikkelsen, Válur, Vestmanna, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3700 gr.

18. desember fingu Eyð Eidesgaard og Bogi Johannesen, Kollafirði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3900 gr.

19. desember fingu Anna Maria og Svend Åge Seloy, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4350 gr.

20. desember fingu Hanna Bisp og Mikael Johannsson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3350 gr.

20. desember fingu Ellfríð og Christian Martin Dam, Kollafirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4050 gr.

22. desember fingu Sóley Forberg og Pauli Ellingsgaard, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4000 gr.

22. desember fingu Annbritt Ellingsgaard og Hallur Petersen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3900 gr.

23. desember fingu Birgitte Dalum og Gunnar Sonni Ellefsen, Århus, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3500 gr.

24. desember fingu Vígdis og Asbjørn Johannesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

25. desember fingu Helena Geyti Jacobsen og Kjartan Jacobsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3600 gr.

25. desember fingu Julia og Eyðun Zachariasen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3850 gr.

26. desember fingu Judith Joensen og Dánjal Petur Olsen, Hósvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3425 gr.

27. desember fingu Arnfríð Joensen og Rógvi W. Poulsen, Runavík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3900 gr.

27. desember fingu Beinta Mortensen, Argir, og Jens Arne K. Sørensen, Eiði, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4000 gr.

28. desember fingu Sheila Petersen og Sonni á Horni, Fuglafirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3700 gr.

29. desember fingu Beinta Nielsen og Súni Fríði Johannesen, Kvívík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4150 gr.

30. desember fingu Arnvør og Rói á Torkilsheyggi, Nes, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4400 gr.

31. desember fingu Birita og Janus M. Joensen, Norðragøtu, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3950 gr.

31. des. fingu Britt og Magni Johannesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2775 gr.

Nøkur minningarorð um
Eivind Kjærbo
Sumba

Ja, so komu deyðsboðini av Eivind, hetta var leygardagin tann 13. desember. Ein kann siga at hetta hevur verið ein tung tíð, tí hetta var triðju ferð, ið farast mátti til jarðarferð í Suðuroy, men tyngri hevur hon verið hjá teim avvarðandi.

Eivind var ein kendur sumbingur, um ein segði Eivind hjá Ebbuni, so visti øll hvør tað var… Eivind gjørdist 81 ár.

Tað eru mong ár síðani vit komu at kennast, tað var í 1947.

Eivind var ein merkismaður í nógvar mátar, og hann var álitismaður í tí arbeiðinum sum hann tók upp á seg, og tað er ein verunleiki soleiðis hjá einum føroyingi sum er bæði sjómaður, útróðrarmaður og arbeiðari, hann kemur ofta at hava skiftandi arbeiði. Soleiðis var eisini hjá Eivind. Millum annað róði hann út í Grátifjørðinum í Grønlandi. Hann arbeiddi eisini eina tíð í Føringahavnini í Grønlandi.

Eg minnist hann fleiri ferðir nevna, at hann hevði arbeitt saman við fuglfirðingum og hann tosaði ofta um tað góða samstarv, ið var har.

Annars undir krígnum sigldi hann við einum skipi frá Vági, til Skotland við fiski. Hann og pápin skiftust um at fara annan hvønn túr.

Eina tíð arbeiddi Eivind í Havn hjá einum arbeiðsgevara. Hann var eisini við at fullføra vegin oman til Víkarbyrgi.

Eivind var ein djarvur bjargamaður. Hann hekk mangan í línuni tá egg ella fuglatíð var. Eina ferð hann var til bjarga kom ein steinur úr berginum og streyk við høvdið á honum. Hann bløddi so illa, at menn máttu bina skjúrtina um høvdið á honum fyri at støðga blóðinum. Men hvør var í berginum nakað aftan á, tað var Eivind.

Eitt sermerkti Eivind, hann hevði eitt sjálvsamt gott minni, og kundi greiða frá nógvum hendingum. Tað var nokk fáar bygdir hvar Eivind ikki kendi onkran og søgu hansara.

Eivind hevði eina sera vakra rødd at syngja ella kvøða við.

Eg og konan (systurin) sakna hann nógv, tí vit hava vitjað Sumba á hvørjum ári, og bústaður okkara í Sumba hevur veirð hjá Eivind og Mimmy. Hetta heim tykist okkum sum okkara egna heim, tí blíðskapurin hevur verið stórur.

Ta seinastu tíðina hevur sjúkan plága honum ógvuliga nógv. Og nú orkaði hann ikki meira, men mátti lúta.

Seinast ið vit vóru inni á gólvinum, til seinastu jarðarferð, at heilsa uppá hann, kundi ein hoyra hann ferð eftir ferð rópa á Jesu navn vegna pínu. Jesus var hansara álit. Tá kom eg at hugsa um eitt sálmavers:

Frelsari, hevði ikki eg teg funnið,
og hevði blóð títt fyri mær ei runnið,
hvar skuldi so eg armingin mær venda,
bøn mína senda?

Í kirkjuni bleiv so vakurt sungið sangur úr sálmabókini, nr. 561, hvar seinasta ørindi sigur:

Eg gevi meg í Jesu hond,
eg ikki ráð skal sakna,
hann førir meg til lívsins lond,
hvar allir stormar tagna.
Um vit í moldum eru huld –
for Kristi skuld
vit lívsins morgun vakna.

Sumbingar hava eina vakra siðvenju, tað er at syngja sálmin nr. 460 í tí donsku sálmabókini, á gravarbakkanum til seinast, hvar fyrsta ørindi ljóðar:

Herrens Venner singen Sinde
Mødes skal for sidste Gang;
Naar til Afsked Taarer rinde,
Dette Ord har lifl ig klang.

Guds friður hvílir yvir tær Eivind.

Símun P. Poulsen

Andlát

18. desember
Torbjørn Simonsen, fyrrverandi lærari, Tórshavn, 77 ár.

19. desember
Emil Fróði Olsen, Toftir, 28 ár.
Jón Mikkjal Henriksen á Sandi, vanliga nevndur Nonni, 76 ár.

20. desember
Herborg Davidsen, Sørvági,ættað av Eiði, 78 ár.

21. desember
Anna Katrina Mortensen, Tvøroyri, 84 ár.
Emil Joensen, Froðba, 81 ár.

22. desember
Sofus M. Jakobsen, Tórshavn, 68 ár.

23. desember
Laura Kristiansen, fødd Joensen, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Keypmannahavn, 72 ár.

26. desember
Jóannes Brøðraberg, 93 ár.

27. desember
Effe millum Garðarnar, Klaksvík, 73 ár.

29. desember
Jacob Jensen, Tórshavn, 84 ár.
Olivia Jacobsen, Kunoy, 88 ár.

30. desember
Ismar Joensen, Fuglafirði, 84 ár.

Dagurin

3. januar. Enokur, sum gjørdist 365 ára gamal. Navnið merkir vígdur ella royndur.

4. januar. Metúsalem, sonur Enoks. Hann gjørdist 969 ára gamal.

5. januar. Símeon. Halgimenni úr Kilikiu í Lítluásiu, sum doyði í árinum 459. Fekk navnið Stylites, tá ið hann í 422 fekk sær tilhald á einari 6 alin høgari súlu. Súla eitur stylos á grikskum.
Hebráiska navnið Shimon er av somu rót sum navnið Sámuel og merkir *lítli Sámal.*

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Birta Viderø
f. 9. apríl 1907 d. 11. desember 2003

Hósdagin 11. desember andaðist Birgitte Margrethe Viderø, vanliga nevnd Birta, 96 ára gomul.

Birta var ættað av Viðareiði, dóttir Annu og Jóannes Joensen.

Hon giftist í 1933 við Niels Johannes Viderø av Viðareiði.

Tey fluttu til Havnar í 1934 og búsettust í Gundadali í 1935.

Tey fingu trý børn: Emmu, sum býr í Havn, Ásbjørn, sum býr í Klaksvík, og Sverra, sum býr í Havn.

Niels Johannes andaðist í 1968, 68 ára gamal.

Anna Helena og Joen Jacob Mortensen gullbrúdleyp

Týsdagin 30. desember høvdu Anna Helena og Joen Jacob Mortensen í Klokkaragøtu í Havn verið gift í 50 ár. Tey bæði teljast avgjørt millum tey friðarligu í landinum. Anna Helene arbeiddi í nógv ár á Lágargarði, og Joen Jacob var múrari.

Anna Helena er úr Havnini. Foreldrini vóru Elsubeth Malena, sum var ættað úr Svínoy, og Sámal í Gong. Tey fingu sjey børn: Jens, Petur, Ragnhild, Maria, Helgi, Flemming og Anna Helena. Eftir á lívi eru umfram Annu Helenu Mia og Flemming, sum øll búgva í Havnini.

Joen Jacob er svínoyingur og millum svínoyingar verður hann nevndur Joen Jacob í Ovasta húsi. Foreldrini vóru Anna Karhrina og Elisias, sum var ættaður úr Húsavík. Tey fingu fimm børn: Johanna Olina, Joen Jacob, Johannes Alfred, Hans Jacob og Anna. Johanna Olina og Anna eru farnar. Johannes Alfred og Hans Jacob búgva í Klaksvík.

Joen Jacob fór sum teir flestu tá í tíðini til skips. Hann sigldi eitt nú við Kelduni og Svínoynni, sum pápi hansara í nógv ár var við. Joen Jacob gekk á skiparaskúla hjá Fischeri Heinesen í Klaksvík, og hann var bestimaður við Svínoynni. Tað mundi vera síðsta árið, at Jákup hjá Jensi førdi hana.

Tá ið hann var fluttur til Havnar, fór Joen Jacob at arbeiða hjá svágrinum Peturi í Gong. Meðan hann arbeiddi har, fekk hann sveinabræv sum múrari. Saman við Hanusi Hansen ella Hanusi hjá Amaliu, sum eisini var ættaður úr Svínoy, hevur Joen Jacob útinnt nógv múraraarbeiði í høvuðsstaðnum og eisini aðra staðni.

Í Ovasta húsi vóru teir musikalskir, og Joen Jacob hevur spælt bæði harmoniku og mandolin. Hann var í mong ár tenorur í sangkórinum í Ebenezer, har hann og konan framvegis hava teirra andaliga heim.

Joen Jacob hevði bát saman við svágrinum Heina Svarthamar, og Anna Helena og Joen Jacob og yngra ættarliðið plaga at vitja í Svínoy, har tey eiga húsini, sum foreldrini hjá honum bygdu í Lágbø.

Anna Helena og Joen Jacob eiga fimm børn: Helgi, Atli, Ragnar, Elisabeth og Sóley. Helgi, Atli og Elisabeth búgva í Havnini, Ragnar býr í Noregi. Barnabørnini eru tólv í tali.

75 ár

Í dag, 3. januar, fyllir Páll Mikkelsen, civilverkfrøðingur, Tórshavn, 75 ár. Hann er burturstaddur.

Marianne Laiderz og Ásvald Simonsen:
Giftust í Dómkirkjuni í Havn

Marianne Laiderz og Ásvald Simonsen uttan fyri Mayfairhotellið í Keypmannahavn á veg til Føroyar at giftast
Mynd: TRAVEL PEOPLE

Í seinastu útgávuni av danska ferðavinnublaðnum Travel People stóð ein grein um at stjórin á Mayfair Hotel í Keypmannahavn og Malmø, Marianne Laiderz, skuldi giftast við føroyinginum Ásvaldi Simonsen í Dómkirkjuni í Havn týsdagin 30. desember 2003.

Ásvald Simonsen er 44 ára gamal og úr Hoyvík, har hann eisini vaks upp.

Eftir at hava fingið sær handilsútbúgving hevði hann í fleiri ár egnan ítróttarhandil í Havn. Fyrst í 80-uunum hevði hann eisini ein hýruvogn koyrandi á bilstøðini Auto í Havn.

Síðan 1984 hevur Ásvald búð í Danmark. Hann er umboðsmaður fyri týsku Polytan fyritøkuna og selur t.d. kunstgras til ítróttarvøllir, rennibreytir og stólar til ítróttarøkir. Hann selur eisini til Føroyar.

Marianne Laiderz er útbúgvin innan hotellvinnuna og hevur seinastu árini verið stjóri á Mayfair Hotel í Keypmannahavn og Malmø. Stjórastarvið í Keypmannahavn hevur hon sagt frá sær nú til árskiftið, tí hotellið er selt og kemur at hoyra til eina aðra hotell-ketu.

Minningarorð um mín góða vin
Jens Paula Poulsen

Líka so vist, at okur verða borin inn í henda heim, ja líka so vist er tað, at okur ein dag aftur skulu úr hesum heimi. Nakað soleiðis fullu nøkur troystandi orð á sinni, tá ein av mínum kæru einaferð stóð undir børu, og alt virkaði so myrkt og kalt. Okur eru væl vitandi um henda partin av lívi okkara, men allíkavæl er tað so ómetaliga tungt at bera, tá tað so rakar okkum sjálvi.

Tí er tað so nógv verri at fata, tá fólk í besta aldri so brádliga verða tikin frá okkum. Boðini um, at Jens Pauli ikki var millum okkum longur, vóru hørð at svølgja. Tað kundi ikki passa, ikki hann. 51 ára gamal, í besta aldri, altíð í gongd við okkurt, hevði seyð, hoyggjaði, var væl fyri, nei tað kundi ikki passa. Men tá jeg so ringdi á sjúkrahúsi, hansara arbeiðspláss, tá kundu tey vátta syrgiligu boðini. Øll har vóru eisini skelkaði. Hann var ein so stór persónligheit, ein sum altíð var glaður. Hansara lætta lyndi smittaði altíð av á tey, sum hann umgekst. Bæði arbeiðsfólkið, men so sanniliga eisini sjúklingarnir nutu gott av tí positiva andanum, sum Jens Pauli altíð hevði við sær. Hann var væl kendur um alla oynna, kundi altíð fáa prát í lag við øll hann kom í samband við, ein stór dygd, tá arbeitt verður við sjúklingum, ið ikki altíð hava tað lætt. Jens Pauli var útlærdur timburmaður, men hevur tey síðstu nógvu árini arbeitt sum portørur/ambulansumaður við Suðuroyar Sjúkrahús. Eitt arbeiði hann røktaði væl og gekk høgt uppí. Jeg var ein av teimum, sum kom at arbeiða saman við Jens Paula, og hann var beinanvegin tann sum fekk ein at føla seg væl á arbeiðsplássinum. Altíð fúsur at hjálpa, og at læra frá sær, sera fryntligur, ein ið kundi læra ein nógv. Sum systur mín segði, at var man ikki í góðum lag onkran dagin, ja so fekk Jens Pauli ein í gott lag. Jens Pauli hevði eitt ungt sinn, fylgdi vær við allastaðni, ikki minst innan ítróttin. Sum gamal 1.-deildarspælari var hann til hvønn dyst, og ikki bara á Sevmýri. Og eisini sum billardspælari, taldist Jens Pauli millum teir frægastu.

Hann var sera røkin maður, gekk høgt uppí tað hann var í gongd við. Tað er heimi hjá Jens Paula og Súsonnu eitt gott dømi um, altíð vælhildið, og við einum flottum hava rundanum. Jeg haldi aldrin, jeg havi sæð Jens Paula liggja og dasa uttan fyri húsini hjá sær, antin so slóð hann gras, málaði, spulaði, ella var í gongd við okkurt annað. Og soleiðis minnist jeg hann eisini frá sjúkrahúsinum, altíð fann hann sær okkurt at gera, sjálvt um hansara arbeiðsuppgávur longu vóru loystar. …Og soleiðis fór hann eisini frá okkum, í gongd við at røktað seyðin, sum hann so dúgliga gekk upp í.

Tá ein situr soleiðis, og skal minnast aftur á ein mann sum Jens Paula, so virka orð so fátækslig og lítisigandi. Tað eru so nógvar hendingar, ein heldur kundi nevnt. Onkran buldrasligan náttartúr kanska við ambulansunum í toku eftir oyggj, hina ferðini okur koyrdu út til tín at vísa tær tann nýggja ambulansan okur høvdu fingið, ella hitt summarið, tá okur gingu uppi á takinum á sjúkrahúsinum í sólskininum, ella okkurt Gamlaárskvøld í kantinuni við ræstum kjøti og sangi. Í ár stendur tín stólur tómur Gamlaárskvøld, og tað er so ómetaliga tungt at fata.

Saknurin eftir Jens Paula er stórur. Tann stóra fjøldin til jarðarferðina vitnar eisini um, at Jens Pauli var ein sera avhildin maður, og tað er soleiðis jeg fari at minnast hann fyri, eitt stás, í ordsins rætta týdningi. Til Súsannu, Pól Arna og Sólvu, foreldrini og systkini ið luttaka í stóru sorgini yvir at hava mist Jens Paula, má Harrin styrkja tykkum øll í tíðini, sum kemur. Okur eru nógv, sum føla við tykkum í tykra stóru sorg. Hvíl í friði góði vinurin, okur gloyma teg ikki.

Við hesum fáum orðum vil eg lýsa fríð yvir minnið um mín góða vin Jens Paula Poulsen.

Ein vinur